Trivnaðarætlan

Hvalbiar skúli

Virðisgrundarlag skúlans

Tá vit skulu gera eina trivnaðarætlan, mugu vit hyggja eftir, hvørji virði leggja vit dent á í okkara skúla

Grundarlag skúlans byggir á:

Fakligan førleika: Skúlin skal virka fyri, at undirvísingin hjá hvørjum einstøkum næmingi er mennandi, avbjóðandi, fjølbroytt og fyrireikar næmingarnar til framtíðina. Øll børn hava rætt til og brúk fyri avbjóðingum og fakligum krøvum á sínum støði hóskandi til evni og áhuga, og fakligur førleiki skapar gleði og mennir sjálvsvirði.

Tryggleika: At bæði næmingar og lærarar kenna seg trygg í skúlaumhvørvinum. Tryggleiki er treytin fyri, at tú torir at ganga nýggjar leiðir og torir at standa fram, og hetta er neyðugt til tess at nema sær lærdóm og at mennast sosialt

Samstarv: At gott samskifti og samstarv er bæði innanhýsis og við heimini. Tað er av týdningi at hava álit á førleikarnar hjá hvør øðrum, tí samstarv er ein gjøgnumgangandi táttur í øllum lívsins virki, sum ein er partur av, báði í fakligum, sosialum eins og altjóða høpi.

Virðing: At tollyndi valdar, og øll kenna seg vird og góðtikin. Tað er ein sannroynd, at øll eru ymisk og hava ymiskan tørv, og tí er tað neyðugt, at børn læra seg at hava virðing fyri felags virðum og sjónarmiðum og at virða umhvørvið og alt, sum í umhvørvinum er.

Ja-ligt umhvørvi: At børn og vaksin eru ja-lig, so tað er gott og trygt at vera í skúlanum. Hugburður og fimi koma ikki av sær sjálvum, og tí mugu næmingarnir uppliva, at tey hava viðburð og kenslu av at eydnast, at tey hava ávirkan og ábyrgd, og at tey fáa rós og duga sjálvi at rósa. Tí mugu tey læra seg at handfara “rós og rís” og venja síni evni til innliving(empati).

Trivnaðarætlan

Í Hvalbiar skúla vilja vit, at allir næmingar trívast og mennast. Hendan ætlan sigur, hvussu vit í skúlanum vilja vera hvør ímóti øðrum, hvat happing er og hvussu vit fyribyrgja happing og fáa øll at trívast.

Í Hvalbiar skúla vilja vit:

- At tað er pláss fyri øllum, og at vit hava umsorgan fyri hvørjum øðrum
- At øll læra at lurta eftir hvørjum øðrum og virða hvør annan
- At øll kenna seg trygg og mennast bókliga, handaliga og sosialt
- At øll kenna seg sædd, hoyrd og viðurkend
- At øll fáa so gott sjálvsvirði sum gjørligt
- At øll tora at siga sítt
- At øll kunnu arbeiða saman
- At happing verður tikin í størsta álvara
- At allir næmingar skúlans kenna seg at hava samábyrgd av trivnaðinum

Happing

Happing skal fyribyrgjast og steðgast, tí bæði happari og tann, sum verður happaður, kunnu verða merkt av hesum restina av lívinum. Happing hevur keðiliga ávirkan á trivnaðin í flokkinum og skúlanum sum heild.

Talan er um happing, tá ið onkur regluliga í ávíst tíðarbil verður illa viðfarin av onkrum øðrum ella hildin uttanfyri felagsskapin.

Tað er týdningarmikið at skyna á at happa og at arga.

At arga

At arga nýtist ikki at vera illa meint, men kann blíva til happing. Tað er ymiskt, hvussu tey, sum verða argað, uppliva argingina.

Hvussu arbeiða vit lærarar við at fyribyrgja happing?

- Vit vísa týðuliga, at happing verður ikki góðtikin
- Vit eggja næmingarnar til at læra seg at loysa ósemjur á virðiligan hátt
- Vit arbeiða við at menna sosialu førleikarnar hjá næmingunum
- Vit læra næmingarnar at seta orð á sínar kenslur í staðin fyri t.d. at sláa
- Vit hjálpa næmingunum at loysa sínar ósemjur, tá ið tørvur er á tí
- Vit læra næmingarnar at hjálpa teimum, sum ikki hava tað gott, í staðin fyri einans at hyggja at
- Vit læra næmingarnar at kennast við sína ábyrgd í ósemjum
- Vit læra tey at leggja ósemjur aftur um seg
- Vit læra tey at boða frá, næmingar eiga at tala at, um aðrir næmingar ikki verða væl viðfarin
- Vit gera floksreglur í flokkunum
- Vit virka fyri góðum samstarvi millum skúla og heim, og trivnaður er fastur táttur til foreldraviðtalur
- Vit samstarva við heilsufrøðingin um trivnaðin hjá næmingum

Tekin um mistrivnað

Niðanfyri er ein listi við teknum, sum benda á, at alt ikki ruggar rætt. Tað er ikki vist, at talan er um happing, men hetta eru tekin, sum vit øll mugu taka í álvara bæði við hús og í skúla.

- Næmingurin vil ikki í skúla – sum heild ella ávís tíðarskeið
- Næmingurin torir ikki ganga í og úr skúla - júkar um at verða koyrdur ella velur sjálvur ein umveg
- Næmingurin kemur til hús við oyðiløgdum bókum, lutum ella klæðum
- Næmingurin hevur blá merki, skursl ella aðrar løstir
- Næmingurin hevur ikki vinir við til hús
- Næmingurin hevur ongan góðan vin
- Næmingurin svevur illa – hevur marruna og grætur
- Næmingurin missir áhugan fyri skúlanum og klárar seg verri enn áður
- Næmingurin tykist at vera í ringum lag, tunglyntur ell í skiftandi hýri
- Næmingurin sigur seg ofta vera sjúkan, t.d. ilt í búkinum

Tað hevur týdning, at barnið aftur fær sjálvsálit og álit á, at tit saman kunnu loysa hetta.

Hvat kunnu foreldur gera, tá mistrivnaður er?

Tá ið foreldur varnast, at barnið verður happað, er týdningarmikið at skilja kenslurnar hjá tí og fram um alt at stuðla barninum.

Um barn tykkara happar onnur, skulu tit fáa tað at kenna ábyrgd av tí, tað hevur gjørt, og stuðla barninum at broyta hugburð.

Far í holt við trupulleikan sum nakað, ið kann og skal loysast.

Setið tykkum í samband við :

- flokslæraran/flokstoymi
- leiðslu
- heilsufrøðing.

Um alt ikki gongur, sum tað skal

Um næmingur vísir tekin um mistrivnað, skal skúlin taka stig til at bøta um hetta. Flokslærarin hevur ábyrgdin av hesum.

Alt eftir hvat mistrivnaðurin snýr seg um, kann flokslærarin t.d.:

- Tosa við næmingin
- Tosa við heimið
- Tosa við toymið
- Tosa við flokkin
- Tosa við AKT-læraran
- Tosa við Førleikastovuna
- Tosa við SSP læraran
- Tosa við heilsufrøðingin
- Tosa við leiðsluna

Við støði í tí ítøkiliga málinum verða neyðug trivnaðarátøk sett í verk.

Hvat kunnu foreldur gera til tess at fyribyrgja happing?

- Vísið týðuliga, at happing verður ikki góðtikin
- Tosið við barnið um munin á at *slatra* og *boða frá*, tá ið happað verður
- Hjálpið barninum at skyna á at arging og happing
- Venjið barnið at loysa ósemjur við hús
- Latið barnið hava vinir við til hús, so ofta tað hevur hug
- Tosið jaliga um floksfelagarnar og foreldur teirra
- Tosið jaliga um starvsfólk skúlans og skúlan sum heild
- Verið virkin í felags tiltøkum í flokkinum
- Raðfestið, at barn tykkara altíð fer í føðingardag hjá øðrum
- Bjóðið øllum flokkinum, øllum gentunum ella øllum dreingjunum í føðingardag í staðin fyri at velja nøkur
- Síggið tað sum eina dygd, at tit eru við til at basa happing

Hvussu fáa vit øll at trívast í skúlanum?

Trý avgerandi viðurskifti:

- **At fáa tigandi meirilutan av næmingum at siga frá.**
- **Lærarar og námsfrøðingar, sum eru tilvitaðir um trivnað**
- **Foreldur, sum vísa samábyrgd**

Dagliga trivnaðararbeiðið

Í trivnaðararbeiðinum í skúlanum hevur arbeiðið í flokkinum avgerandi týdning. Dentur verður lagdur á hetta longu frá fyrsta degi.

Flokslærarin og hinir lærarar floksins skipa fyri tiltøkum og tosa við flokkin um evni, sum hava við trivnað og happing at gera. Lærarin skal eggja næmingunum til at hjálpa hvør øðrum, og at siga frá, um tey sjálvi ella onnur ikki trívast ella eru fyri ágangi í skúlanum.

Flokslærarin skal regluliga seta tíð av, har trivnaðurin í flokkinum og onnur viðkomandi evni vera viðgjørd.

Tá ið fríkorter eru, skulu lærararnir, ið hava garðvakt, altíð vera millum næmingarnar, soleiðis at teir kunnu eygleiða og hjálpa næmingunum, um tað er neyðugt.

Flokkarnir hava sítt flokstoymi, og tey hava við alt tað dagliga í flokkinum at gera.

Trivnaðartiltøk:

Hvalbiar skúli hevur mong trivnaðartiltøk gjøgnum árið, sum eru til gleði, gagns og samansjóða skúlan.

Her kunnu verða nevnd:

- Ítrottardagar og útferðir
- rennidagur
- foreldratiltøk
- jólahugni
- jólaevnisdagar og framførslur
- dansur millum jól og føstu
- føstulávintshald
- spurnarkappingar, sangløtur, ymiskir túrar norðureftir, flokslæraradagar o.m.a.

Foreldrasamstarv:

Skúlin leggur dent á gott foreldrasamstarv, sum umframt dagliga samskiftið, fer fram á foreldrafundum, viðtalum og tiltøkum saman við næmingunum.

Førleikastovan:

Endamálið við førleikastovuni er, at hjálpa lærarunum at menna einstaka næmingin og allan flokkin, har tørvur er á tí.

Fólk við serkunnleika skulu manna førleikastovurnar.

- AKT lærari (hevur útbúgving innan Atferð, Kontakt og Trivnað)
- SSP lærari (hevur samstarv við Sosialar myndugleikar, Skúlar og Politi)
- Lesivegleiðari (gevur vegleiðing í lesing og skriving)

Førleikatoymi, sum er sett saman av leiðslu skúlans, AKT- lærara, SSP lærara og lesivegleiðara, hevur sett nakrar ætlanir fyri komandi skúlaár:

*** Næmingasamrøður:**

Fyri at geva sær stundir til at lurta eftir næmingunum, og hvat tey siga um skúlans viðurskifti og teirra egna trivnað, hava vit næmingasamrøður í øllum flokkum eins og undanfarin ár. Her prátar flokslærarin saman við SSP ella AKT læraranum við næmingin, og vilja tey fylgja við í trivnaðinum gjøgnum árið.

*** Samtalustova:**

Í samtalustovuni hava næmingar skúlans møguleika at koma til orðanna, og í tryggum kørmum fáa stuðul og hjálp.

*** Spæliliðið:**

Spæliliðið hevur eina serstøðu í Hvalbiar skúla. Hetta hevur virkað væl í fleiri ár og havt stóra undirtøku millum næmingarnar. Tað er AKT lærarin, sum saman við toymi skipar hetta arbeiðið.

Næmingar í miðdeildini eru á skeið og læra at skipa spøl í fríkorterum fyri yngru næmingum skúlans.